# Javnaðarflokkurin er púra farin av sporinum

**Tað vóru fólk úr arbeiðararørsluni, sum stovnaði javnaðarflokkin, men tað var neyvan til tað, sum flokkurin verður brúktur til nú á døgum, sigur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag**

LANDSFUNDUR HJÁ JAVNAÐAR-FLOKKINUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Høvdu tey gomlu javnaðarfólkini vita aftur í verðina, høvdu tey øtast yvir at sæð, hvat flokkurin er blivin til.

Tað er skoðsmálið, sum forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag gevur Føroya Javnaðarflokki, nú hann hevur landsfund á toftum í kvøld og í morgin.

Vígdis Johannesen heldur nevniliga, at javnaðarflokkurin er farin heilt av sporinum.

– Tað vóru fólk úr arbeiðarastættini, sum stovnaði javnaðarflokkin og teir stovnaðu flokkin til at arbeiða fyri áhugamálinum hjá arbeiðarastættini og teimum lágløntu.

Men Vígdis Johannesen sigur, at tað er langt síðani, at javnaðarflokkurin kundi kalla seg sein arbeiðaraflokk.

– Í øllum førum er tað langt síðani, at hann hevur víst tað í verki, at hann arbeiðir fyri tey minni mentu í samfelagnum, leggur hon afturat.

Sostatt heldur hon, at flokkurin er farin heilt av sporinum og hon heldur rætt og slætt, at tey gomlu javnaðarfólkini høvdu øtast, høvdu tey sæð flokkin í dag.

– At javnaðarflokkurin er ein arbeiðaraflokkur, er søga!

### Avgjald á tey minni mentu og skattalætta til tey múgvandu

Forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag vísir á, at seinastu árini hevur flokkurin verið við til at lagt avgjøld á skattaborgaran.

Og avgjøldini raka tey minnu mentu harðast, tí lægri lønin er, verri eru ráðini at betala avgjald.

– Samstundis hevur flokkurin sett skattalættar í gildi, har tey lágløntu fáa minst í skattalætta og tær frægari inntøkurnar fáa mest.

Harafturat hevur javnaðarflokkurin eisini víst í verki, at hann hevur onga sum helst virðing fyri fakfelagsrørsluni.

– Tað hevur hann gjørt tvær ferðir, bara í summar, leggur hon afturat og sipar til politisku uppíleggingina í arbeiðsssteðgin hjá maskinmeistarunum hjá SEV og til ætlaðu uppíleggingina í arbeiðsssteðgin hjá Starvsmannafelagnum í heyst.

– Javnaðarflokkurin hevur víst, at ger eitt fakfelag tann minsta vørrin, er flokkurin til reiðar at draga tey í Løgtingið og slíkt ber ill til at kalla ein fakfelagsflokk.

Men eigur javnaðarflokkurin ikki eisini sín stóra leiklut í, at samhaldsfasti eftirlønargrunnurin er styrktur so at útgjaldið úr hon hækkar? Hevur tað ikki týdning?

– Jú, tað hevur tað - men hvør betalir samhaldsfasta. Tað gera vit jú sjálvi við einum prosentparti av hvørjari løn, so samhaldsfasti er einki annað ein táta, sum flokkurin fekk fyri at góðtaka skattalættar og avgjøld.

– Men júst hetta vísir, hvussu veikur hann er í samgonguni, tí tað sæst onki av stevnuskránni hjá honum í tí førda politikkinum.

Hon heldur ikki, at orsøkin til, at flokkurin er broyttur so nógv, er tað, at tíðirnar broytast og at hann noyðist at fylgjavið tíðini.



*– Javnaðarflokkurin er snaraður til høgru og nú er lítið eftir av arbeiðaraflokkinum, sum verkafólk stovnaðu á sinni. Ein tann størsta uppgávan hjá flokkinum verður tískil at koma aftur á beint, heldur Vìgdis Johannesen í Havnar Arbeiðskvinnufelag*

– Tað koma at vera láglønt og minni ment í samfelagnum í mong ár afturat og fólk, sum hava brúk fyri, at onkur talar teirra sak. Og javnaðarflokkurin kundi røkt teirra áhugamálog verið ein arbeiðaraflokkur, uttan at slept hugsjónum, heldur Vígdis Johannesen.

Annars heldur hon, at politikarar geraov lítið fyri at skapa karmar til vinnulívið at virka undir og fyri at menna samfelagið.

– Politikarar hava tosað um alternativar vinnur alla mína tíð, men eg dugi framvegis ikki at síggja nakað til hetta, leggur hon afturat.

# Gera onki fyri at minka um gjónna ímillum tey lágløntu og tey vælløntu

**Javnaðarflokkurin ger onki fyri at minka um stættarmunin í Føroyum, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

LANDSFUNDUR HJÁ JAVNAÐAR-FLOKKINUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Javnaðarflokkurin hevur svikið tey, sum hann var stovnaður til at verja. Ístaðin er hann rýmdur, hagar tær nógvu atkvøðurnar eru og tað er hjá akademikarunum og teimum væl løntu við almennum størvum.

Tað heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Hans Joensen.

Hann heldur, at javnaðarflokkurin ger als onki fyri at minka um stættarmunin ímillum tað láglønta verkafólkið og tey við teimum betri lønunum.

– Eg havi mangan tosað um, at gjógvin ímillum stættirnar eigur ikki at dýpast, men tað verður hon alla tíðina, tí lønarhækkingar eru altíð í prosentum og ikki í krónum og eitt prosent av eini arbeiðaraløn er ikki tað sama sum eitt prosent av eini akademikaraløn og tí veksur stættarmunurin alla tíðina.

– Men í hesum sambandi hevur ongin hjálp verið at fingið frá javnaðarflokkinum.

Hans Joensen sigur, at ístaðin fyri at lætta byrðararnar hjá verkafólki, verða fleiri og fleiri avgjøld løgd á allar løntakarar, eitt nú hækkar vegskatturin.



*Javnaðarflokkurin hevur vent verkafólkinum bakið og er rýmdur hagar tær nógvu atkvøðurnar eru og tað er hjá akademikarunum og teimum væl løntu við almennum størvum, heldur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

– Tað er ikki ein samhaldsføst skipan. Vildi landsstýrið eina samhaldsfastaskipan, vórðu tyngri byrðar lagdar á teir vælløntu herðarnar, ístaðin fyri at at leggja líka tungar byrðar lagdar á øll.

Eitt annað dømi er oljuavgjaldið, sum kundi verðið ein veruligir lætti hjá verkafólki, men tað verður eisini tvíhildið um tað.

Eitt annað dømi er, at tey vælløntu fáa fleiri ferðir so høganskattalætta, sum tey lágløntu.

### Svíkur tey, hann skuldi verja

Hans Joensen sigur, at sum støðan er í dag, hevur hann als ikki fatanina av, at javnaðarflokkurin arbeiðir til frama fyri tey, sum hann í síni tíð varð stovnaður til at verja áhugamálini hjá.

– Tey, sum flokkurin varð stovnaður til at verja áhugamálini hjá, dragna longur og longur afturúr, uttan at flokkurin ger nakað fyri at venda gongdini. Eg má siga, at sum formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag føli eg, at tað er ómetaliga torført at vinna verkafólkinum somu sømdir í samfelagnum sum tey vælløntu hava.

Eitt, sum hann hugsar um, er rætturin til at vera heima hjá sjúkum børnum.

– Tað hava alment lønt, men ikki verkafólk, men eg haldi, at skal ein samfelagsbólkur hava tey rættindini, átti ein lóg at verðið gjørd, sum gav øllum somu sømdir.

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelagið sigur, at tá ið samgongan varð skipað, varð ein avtala gjørd um skattlætta og samhaldsfasta.

– Eg haldi, at hendan avtala er heilt av leið, tí sum tað vísir seg eru tað akademikararnir sum gera av, um tey lágløntu, sum ikki hava tey stóru ráðini at spara til eftirløn, skulu hava eina virðiliga eftirløn og tað átti javnaðarflokkurin ikki at góðtikið.

– Tað einasta rætta er at styrkja Samhaldsfasta munandi, so at øll kunnu fáa eina virðiliga eftirløn, leggur hann afturat.

Hans Joensen sigur, at hann kundi hugsa sær eina semju ímillum fakfeløg og politikarar um, hvussu lønarlagið skal vera og, hvussu lønin skal dagførast.

– Hetta kundi gjørt, at keypiorkan kundi vaksið og tað kundi eisini ført til, at vit fingu tað friðarligari á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis sum politikarar mangan hava lóknast eftir.

Men tað sær ikki út til at nakað hendir og tí verður tað ein galin endi hjá verkafólki, tí tey verða alsamt longur og longur sigld afturúr, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

## Sjálvstýrisflokkurin er við

Í Sosialinum í gjár skrivaðu vit um eitt uppskot, sum er lagt fyri tingið um at broyta umstrídda oljuavgjaldið. Vit søgdu, at tað var miðflokkurin, sum hevði lagt uppskotið fram. Tað rætta er, at tað er miðflokkurin og sjálvstýrisflokkurin sum hava lagt uppskotið fram í felag. Orsøkin til mistakið er, at í álitinum frá fíggjarnevndini stendur miðflokkurin av misgáum at vera einsamallur uppskotsstillari.

*–áki–*

# Mín stóra veljaran a

**– Tað verður avgjørt mítt mál at spæla kortini so mikið væl, at vit koma aftur í samgongu eftir næsta val, sigur løgmaður upp undir landsfundin hjá javnaðarflokkinum í kvøld og í morgin**

LANDSFUNDURIN HJÁ JAVNAÐAR-FLOKKINUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Javnaðarflokkurin hevur fingið ein nýggjan veruleika. Á landsfundinum í kvøld og í morgin, verður tað mín stóra uppgáva, at fáa veljaran at skilja og at góðtaka tann nýggja veruleikan.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, nú javnaðarflokkurin hevur landsfund á Svangaskarði á Toftum í kvøld og í morgin.

Tað, hann sipar til, er, at javnaðarflokkurin nú situr í samgongu, eftir at hava sitið í andstøðu í heili átta ár.

Hesin landsfundurin verður tískil eitt sindur